# Martin Simonsen úr Fuglafirði gjørdist bestur

**Týskvøldið, 18. juni, vórðu prógv handaði á Klaksvíkar Sjómansskúla; 13 heimaskiparaprógv, 12 kokkaprógv og 6 sjóvinnuprógv**

PRÓGVHANDAN
*Rúna Sivertsen*

Umframt at útbúgva skiparar, heimaskiparar og kokkar, hevur Klaksvíkar Sjómansskúli ein sjóvinnuflokk.

Tað er bert á Klaksvíkar Sjómansskúla, tú kanst fara á skeið og fáa sjóvinnuprógv. Skeiðið gongur yvir fimm mánaðir og er t.d. í Danmark eitt krav, um tú yvirhøvur skalt sleppa til skips.

Umframt vanliga skeiðið í sjóvinnu gevur Klaksvíkar Sjómansskúli sjóvinnuflokkinum frálæru í dugnaskapssigling. Í hesum skulu næmingarnir upp til próvtøku, og fáa teir tá prógv í »Dugnaskapsroynd« í sigling umframt obligatoriska Sjóvinnuskúlaprógvið.

Hetta er ein serstakliga góð útbúgving og barlast hjá teimum, sum ætla sær víðari til skipara og skipsførara, siga teir á skúlanum. Hjá teimum, sum ikki hava 10. flokk, er neyðugt fyrst at fara á sjóvinnuskúla.

## Heimaskiparar



*Standandi frá vinstru: Rógvi Magnusson, John Ryan, Símun Petersen, Kristoffer Dragaberg, Sámal Jákup Høgnesen, Sigvard Johannesen, Rohan Jacobsen, Høgni Zachariassen. Sitandi frá vinstru: Terji Poulsen, Sten Mathisen, Nils í Buð, Martin Simonsen, Símun P. Olsen. Martin Simonsen fekk virðisløn frá p/f Chr.í Grótinum og Nils í Buð fekk virðisløn frá Tryggingarfelagnum Føroyar, fyri gott avrik*

## Kokkar

*Standandi frá vinstru: Christian Oluf Christiansen, Høgni á Steig, Hans Olgar Hansen, Knút Vesturtún, Óla Jákup Thomsen og Jákup Ziskason lærari. Sitandi frá vinstru: Tanya Joensen, Guðrun V. Joensen, Randi Lisberg, Sólva Dánjalsdóttir, Jonitha Magnusdóttir, Marin Hentze, Bernhard Gudmundsson vantar á myndini. Guðrun V. Joensen, Marin Hentze og Randi Lisberg fingu virðisløn frá Norðoya Sparikassa fyri gott avrik*



## Sjóvinnuflokkurin

*Standandi frá vinstru: Arnfinn Jacobsen, Johan Johannesen, Ragnar Mouritsen, og Pole Mikkelsen, lærari. Sitandi frá vinstru: Rói Norðoy, Niclas R. Jacobsen, Heðin Hanusson. Arnfinn Jacobsen og Ragnar Mouritsen fingu virðisløn frá Føroya Banka fyri gott avrik*



## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma

**Lydia Poulsen**
**Tórshavn**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum øll, sum á ymsan hátt vístu henni umsorgan, meðan hon lá sjúk.

Tøkk fyri blómur, kransar, telefonuppringingar og gávu til KFUK.

Tøkk til prest, kirkjutænarar, gravarar og sangarar.

Tøkk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina.

Tøkk til tykkum øll, nær og fjar, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Erling, Bjørghild og Mortan við familju**



# Jóansøka á Svalbard



*Tropustremmningur við íshavsstrondina í Longyearbýnum á Svalbard sunnumorgunin*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

FERÐING
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Longyearbýurin, Sosialurin:** Nú lækkar sólin aftur á norðaru álvu og veturin er longu byrjaður hjá teimum svartskygdu. Men í høvuðsstaðnum á Svalbard varð drukkið og dansað seinastu sunnunátt til klokkan vísti, at nú var seint á morgni og kirkjuklokkan fór at kalla til gudstænastu. Tað riggar ikki heilt at siga, at dansað var til tann ljósa morgin á jóansøku á Svalbard, tí sólin stendur eins høgt allar 24 tímar døgnsins, talan er slett ikki um nátt, men fullan dag í samfullar fýra mánaðar.

Og meðan vit sita niðri á sandstrondini í Longyearbýnum, heilt norðuri á 78 stigum, við stirdum jøklum í baksýni og sólini steikjandi, varð pláss fyri djúpari spurningum eisini. Nógv fólk á Svalbard dáma nógv betri veturin enn summarið. Tey halda ikki, at veturin er so myrkur, tí mánin er har, Norðlýsis við og so bláljósið, íð er ein saman blandingur av kava og tí ljósi sum finnst í luftini. Fólk eru um at blíva ør í høvdinum av allari sólinu um summarið og svøvnlagið er ringt.

Men øll eru samd um, at tey hava brúk fyri ljósinum fyri at styrkja seg til veturin, tí gerst hann ov harðbalin, so nívir tungsinni millum tey 3000 fólkini á Svalbard. Ein veiðumaður eg tosi við niðri á strondini sigur at hann, at hann ivast í, um teir sum hava skrivað bíbliuna, hava endurgivið rætt, tá teir skriva á sólin ongartíð setir í paradísi.Tí sól altíð er einki at ynskja sær, men hevur tú myrkrið eisini, so fær sólin við og so fløvar hon langt í sálina.

Til jóansøkuhald á Svalbard fór maður av húsi. Stórt bál varð kynt og og ein diskjockey syrgdi fyri tónleikinum., Og talan var ikki bara um norðmenn, nógv vísindafólk eru á Svalbard, og tey luttóku eisini. Og so vóru russar eisini. Eitt russikst rannsóknarskip lá við bryggju og russar sum búgva í námsbýnum Barentsburg longur úti í Ísfjørðinum.





